# Eingin avtala um nýggja avtalu




Á fundi í London í gjár royndu umboð fyri íslendsku myndugleikarnar at fáa eina tilsøgn frá bretum og niðurlendingum um at endurskoða avtaluna um Icesave-skuldina. Talsmaðurin hjá íslendska fíggjarmálaráðnum, Elías Jón Guðjónsson, sigur við fjølmiðlarnar, at fundurin var gagnligur, men at tað eydnaðist ikki at fáa nakra tilsøgn um nýggjar samráðingar. Partarnir hava heldur ikki avtalað nýggjan fund. Í Íslandi eru stjórnarsamgongan og andstøðan samd um at royna at fáa bretar og niðurlendingar at samráðast av nýggjum um Icesave-skuldina.

# Danska kreppan verður drúgv

Tað fer at taka rúma tíð, til búskaparviðurskiftini í Danmark verða, sum tey vóru undan kreppuni. Eitt nýggj búskaparmeting hjá Dansk Erhverv sigur, at viðurskiftini verða ikki tey somu aftur fyrr enn í fyrsta lagi í 2012. Jens Brendstrup, sum er búskaparfrøðingur hjá Dansk Erhverv, sigur við DR, at í dag er danska bruttotjóðarframleiðslan fyri hvønn íbúgva tann sama sum í 2003. Harafturat kemur, at í ár fer talið á arbeiðsleysum at liggja um 145.000, og tað er eingin skjótur vegur burtur úr einari so djúptøknari kreppu, sigur Jens Brendstrup.

# Føroyakort íblástur til listaverk

**Topografisku linjurnar í føroyakortinum skapa sínar egnu søgur í 45 smátekningum hjá Philippe Carré, sum verða at síggja í Galeri Focus fríggjadagin**

LIST
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*



*Tað eru oftast detaljurnar, sum geva eini mynd sítt egna lív, sigur listamaðurin, Philippe Carré, sum hevur brúkt fleiri vikur um onkra av evarsmáu tekningunum*

Fyrsta myndin, listamaðurin Philippe Carré sá av Føroyum, var eitt sjókort av oyggjunum. Myndin hekk á glasinum í hurðini hjá einum vinmanni í latínarakvarterinum í París. Kortið setti hugflogið í gongd, tankarnir fóru til ótrúligu ferðirnar hjá Odysseus, hjá Jules Verne og Hugo Pratt.

Líka síðani hevur Philippe Carré verið hugtikin av teimum søgum, sum búgva í sjó- og landakortum. Serliga eru tað loyndarfullu topografisku strikurnar, sum veruliga kunnu fáa hugin á ferð, heldur hann.

## Kort fult av søgum

Á nýggju framsýningini í Galerie Focus er tað føroyakortið, sum hevur givið íblástur til 45 smámyndir, teknaðar við blýanti, tusch og akryl á pappír. Saman mynda tekningarnar eina røð við heitinum »Skriva mær eina søgu«, men hvør sær ímynda tekningarnar eitt lítið univers í sær sjálvum.

- Tankin um at fara inn í eina mynd og uppliva eina søgu hevur altíð hugtikið meg nógv, sigur Philippe Carré, sum heldur at landakort her hava eini heilt serlig evni at fáa hugin at reika.

Tað síggja vit eisini ofta á gomlum landa- og sjókortunum, har tey plagdu at tekna inn sjódrekar og havfrýr og ymiskt, sum tey ímyndaðu sær hoyrdi til tey støðini kortini avmyndaðu, minnir hann á.

- Men kort kunnu í sær sjálvum longu vera full av hesum skapningum, um tú bara hyggur nærri ella á ein øðrvísi hátt, tí søgurnar liggja eisini goymdar í landakortunum. Tað valdast hvørjar strikur og formar tú hyggur at, hvørjar søgur tú hevur hug at siga frá. Vit samanbera altíð tað ókenda við tað vit kenna, síggja kendar formar aftur í hurlivasanum, sigur Philippe Carré.

Á ein hátt kanst tú samanbera hetta við at framkalla myndir, heldur listamaðurin. Tá ein fotografur arbeiðir í myrkakamari kann hann stýra ljósinum og hitanum, so at hann fær júst tað fram á myndunum, sum hann vil hava, og so nógvar ella so fáar detaljur, sum hann hevur hug til. Hóast negativið kanska er miseydnað, kann hann lokka tað, sum liggur fjalt í myndini, fram við einum sindri av eyka ljósi og heitari luft.

## Detaljur geva lív

Nakað soleiðis hevur Philippe Carré eisini arbeitt við støðum á føroyakortinum, sum hava loyvt honum at koma allan vegin runt um myndevni. Í myndunum leitar hann ofta eftir sambandinum millum menniskja og náttúru, ella menniskjanum sum part av náttúruni - og øvut.

- Í grundini er tað rættiliga óvanligt, at eitt so modernað fólk livir so tætt at náttúruni, sum tey gera í Føroyum. Tí er tað eisini rættiliga eyðsæð at brúka menniskja og náttúruna her í eini listarligari heild, heldur hann.

- Føroyakortið er óvanliga áhugavert sum íblástur, tí topografisku strikurnar eru so tættar og hava so nógva rørslu í sær. Tær geva mær alt tað tilfarið, eg kann ynskja mær til at skapa mín egna lítla heim. Men alt er ikki bert hugflog, tí nýggju formarnir vaksa framvegis úr strikunum á kortinum, greiðir Philippe Carré frá.

Tí hava myndirnar eisini sama navn, sum staðið á kortinum. Og hyggur tú gjølla, kennir tú uttan iva okkurt fjall, ein dal ella eina bygd aftur. Og tú verður noydd at hyggja gjølla, tí myndirnar máta bert 10 ferðir 10 sentimetrar.

- Eina stóra mynd sært tú, eina lítla hyggur tú at. Á stórum myndum sært tú ofta fyrst og fremst formar og skap, meðan smáar myndir noyða teg at hyggja at detaljunum. Og tað eru oftast detaljurnar, sum geva eini mynd sítt egna lív, sigur listamaðurin, sum hevur brúkt fleiri vikur um onkra av evarsmáu tekningunum.

Framsýningin letur upp fríggjadagin klokkan 16.



Lesið Sosialin so eru tit við